# Bara ein hernaðarmyndugleiki í Føroyum

**Nú verður alt danskt hernaðarvirksemi í Føroyum savnað á einum stað. Flyvestation Torshavn í Mjørkadali og Færøernes Kommando við Hoyvíksvegin eru løgd saman til eina støð, sum kallast Færøernes Kommando, og hon fer at halda til í Mjørkadali**

SAMANLEGGING
*Stefan í Skorini*



*Nýggi og einasti leiðarin av donsku herstøðini í Føroyum, Jesper Dinesen, sigur, at uppgávurnar hjá danska hervaldinu í Føroyum framvegis eru tær somu*
Mynd Jens Kr. Vang

Hósmorgunin var samkoma í bygninginum hjá danska hervaldinum í Mjørkadali. Har var Jesper Helsø, generalloytnantur og ovasti í donsku verjuni, til staðar. Hann lat Jesper Dinesen leiðsluna av nýggju støðini.

Jesper Helsø bað fyrst Jesper Dinesen, fyrrverandi leiðara av Færøernes Kommando við Hoyvíksvegin, um at reisa seg og kunngjørdi, at Jesper Dinesen hervið ikki longur hevði leiðsluna av hesi støðini.

Síðani varð Erik Præstegaard, fyrrverandi leiðari av Flyvastation Torshavn, biðin um at reisa seg, og hann fekk boð um, at hann ikki longur er leiðari av støðini í Mjørkadali.

Síðani varð Jesper Dinesen alment settur sum leiðari av nýggja danska myndugleikanum í Føroyum, Færøernes Kommando í Mjørkadali, meðan Erik Præstegaard verður stabschef ella starvsfólkaleiðari.

Leingi hevur verið greitt, at henda samanleggingin skuldi vera, men nú er samanleggingin endiliga farin fram, og eftir er bara ein danskur hernaðarmyndugleiki í Føroyum.

## Færri fólk

Hóast tað alment er boðað frá eini samanlegging, so verður sjálv samanleggingin ikki framd fyrr enn um hálvtannað ár. Ætlanin er, at hølini við Hoyvíksvegin standa tóm á sumri í 2002.

Áðrenn alt virksemið verður flutt niðan í Mjørkadal, so skal bygningurin umbyggjast, so hann kann hýsa øllum tí nýggja fólkinum. Handverkararnir fara í gongd við arbeiðið 1. mai í ár og verða væntandi lidnir 1. apríl 2002, og tá ber til hjá teimum við Hoyvíksvegin at flyta niðan.

Beint nú eru 107 fólk knýtt at teimum báðum støðunum, men tá samanleggingin er framd, verða bara 80 fólk á støðini. Av hesum eru eini tíggju sivil.

Jesper Dinesen sigur, at talan er ikki um nakrar uppsagnir, men bara um at flyta nøkur fólk niðuraftur til Danmarkar.

Talið av fólki, sum starvast í danska herinum, er nógv minkað seinnu árini, tí miðskeiðis í 60-unum vóru fleiri enn 200 fólk knýtt at danska hervaldinum í Føroyum. Tá var heimsstøðan eisini ein heilt onnur, og tað kravdi fleiri fólk á staðnum.

## Ongar aðrar broytingar

Nýggi leiðarin fyri Færøernes Kommando, Jesper Dinesen, sigur, at uppgávan hjá herinum í Føroyum verður júst tann sama sum frammanundan samanleggingini.

– Okkara uppgáva er fyrst og fremst at hava fyri eini MRCC-støð, sum syrgir fyri bjarging á sjónum. Henda uppgáva er ikki broytt við hesi samanleggingini, men verður bara broytt um politiski myndugleikin krevur eina broyting á hesum økinum, sigur Jesper Dinesen.

Jesper Dinesen sigur eisini, at teirra møguleikar fyri at loysa hesar uppgávur ikki eru skerdir, men at teir eru eins væl førir fyri hesum sum frammanundan.

Samanleggingin er ein liður í "forsvarsforliget 2000-2004", sum bar í sær, at nakrar bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Endamálið er, at sleppa undan at hava yvirskot av fólki í Føroyum.

Jesper Dinesen sigur eisini, at hesar rationaliseringar geva teimum møguleika at gera fleiri íløgur í Føroyum, um tørvur verður á tí.



*Teir tríggir høvuðspersónarnir á samkomuni í Mjørkadali hósmorgunin. Frá vinstru er Erik Præstegaard, Jesper Helsø og Jesper Dinesen*
Jens Kr. Vang

# Alternativið í tilbúgvingini er Marinustøðin

**Færøernes Kommando hevði kunnað verið klár við eini tilbúgvingætlan í sambandi við oljuvinnuna eftir nøkrum vikum. Hetta kann vera eitt gott alternativ, um samgongan ikki tekur undir við loysnini hjá Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni, sum umsitur tilbúgvingina**

TILBÚGVING
*Stefan í Skorini*

Áðrenn oljuvinnan fer av bakkastokki, er alneyðugt at føroysku myndugleikarnir eru tilreiðar við eini tilbúgvingarætlan. Hetta skuldi vera avrátt á samgongufundi fyrr í dag, men úrslitið av hesum fundi var okkum ikki greitt áðrenn evstamark.

Jørgen Niclasen segði við Sosialin í gjár, at um hansara loysn ikki vann frama í samgonguni, so fór hann at royna aðrar loysnir beinanvegin, tí hann vil undir ongum umstøðum hava, at oljuboringin verður útsett við einum ári. Tað verður úrslitið, um ein tilbúgvingarætlan ikki verður klár fyri 1. apríl í ár.

Jørgen Niclasen leggur upp til, at Telegrafstøðin verður keypt, og har verður tilbúgvingin samskipað. Hon skal vera kunna at taka sær av vanlukkum, sum kunnu standast í oljuvinnuni. Óvist er, at um henda ætlanin fær undirtøku í samgonguni.

Jesper Dinesen, leiðari á Fæøernes Kommando, sum umsitur MRCC-støðina í løtuni, metir, talan er um nakrar vikur, áðrenn teir kunnu vera klárir við eini slíkari tilbúgvingarskipan, sum tørvur er á til oljuvinnuna.

Hann leggur tó áherðslu á, at hann við hesum ikki leggur seg úti kjakið um, hvussu tilbúgvingin skal skipast í Føroyum. Hann sigur eisini, at teir skulu hava boð frá myndugleikunum í Danmark, um teir skulu fremja hetta í verki.

Tørvur verður á betri útgerð, um Færøernes Kommando eisini skal hava tilbúgving í oljuvinnuni um hendi, men um boð eru eftir teimum, so hevði tað bara tikið teimum nakrar vikur, til tað hevði verið klárt.

Sitandi samgonga er tó einki fyri at lata danir um tilbúgvingina, og allir flokkar mæla til eina føroyska loysn, men eru ikki á einum máli um, hvussu henda skal fremjast.

Um semja ikki finst í samgonguni um eina føroyska tilbúgvingarætlan, so kann Jørgen Niclasen dúva uppá Marinustøðina.



*Hóast Marinustøðin við Hoyvíksvegin skjótt er søga, so kann hon skipa fyri tilbúgving í sambandi við oljuvinnuna eftir nøkrum vikum*